# Stýrisfundarbók FKF

## 10-08-2010 / 9

*Fundarstað:* Kvívík

*Fundur byrjar kl:* 10:00

*Fundur lokin kl:* 14:00

| Stýrislimir | Viðmerking |
|---|---|
| Karl A. Olsen | |
| Johan Christiansen | |
| Herálvur Jacobsen | |
| Hans Jákup Kallsberg | |
| Delmar Tausen | |
| Dánjal Jákup Jakobsen | |
| Albert Ó. Ellefsen | |
| Jógvan K. Mørkøre, varaform. | |
| Asbjørn Djurhuus form. | |

**Fundarmál nr: 39**

FKF Jour. nr: 09-099

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Hýruvognar, kunngerðaruppskot

Málslýsing: Í telduposti dagf. 24. juli, bjóðar VMR felagnum at viðmerkja uppskot til kunngerð um standard hýruvognsreglugerð.

Málið er lagt fyri FK bólkin 6. juli (09-099_2), við freist at viðmerkja 16. juli. Freistin er síðani longd til 23. august.

Fundarsamtykt: §2, stk. 1, bert loyvi at koyra frá kommununi har loyvi er givið.
§3, um loyvi; loyvishavi skal vera búgvandi í Føroyum; kunnu teir vera búgvandi í aðrari kommunu?
§4 um góðkenning; hevur kommunan møguleikar at fremja góðkenningina.
§5 andsøgn viðv. skráseting og bústað? §5, stk 5 um at opið skal vera alt samdøgrið.
§§ 7-9 Um revsing, bøtur og eftirlit.

Óðkenningin sum eftir uppskotinum skal liggja hjá kommununum, eigir at vera hjá Akstovuni, og tað skal vera frítt at taka túrar alla staðni í Føroyum.

*Støða: Svarskriv sent VMR 13/9-2010, Jour: 09-099_1.2*

---

**Fundarmál nr: 40**

FKF Jour. nr: 09-101

Reist av: Vinnumálaráðnum

Fundarmál: Matvøruvirki, løggilding og skráseting

Málslýsing: Í telduposti dagf. 13. juli, bjóðar Vinnumálaráðið felagnum at viðmerkja uppskot til kunngerð um løggliding og skráseting av matvøruvirkjum. Sí skjal nr. 40.

Fundarsamtykt: Seta fyrispurning um hvussu er við skúla- og dagstovna kantinur og matordningar, og um útleigan av hølum kommununnar til privat eisini koma undir reglurnar.?

*Støða: Svarskriv sent 19/8-2010, Jour: 09-101_1.2*

---

**Fundarmál nr: 41**

FKF Jour. nr: 09-102

Reist av: Almannaráðnum

Fundarmál: Nýggj pensionsskipan, uppskot til neyðugar lógarbroytingar

Málslýsing: Í telduposti dagf. 13. juli, bjóðar Almannamálaráðið felagnum, at viðmerkja uppskot til broytingar í lógarverkinum, sum eru neyðugar fyri at seta í gildi nýggja pensionsskipan. Sí skjal nr. 41.

Fundarsamtykt: Málini 41 og 42 avgreidd undir einum.

*Støða: Sí mál 42.*

---

**Fundarmál nr: 42**

FKF Jour. nr: 09-103

Reist av: Fíggjarmálaráðnum

Fundarmál: Nýggj pensjónsskipan, lógarbroytingar

Málslýsing: Í telduposti dagf. 14. juli, bjóðar eisini Fíggjarmálaráðið felagnum, at viðmerkja uppskot til broytingar í lógarverkinum, sum eru neyðugar fyri at seta í gildi nýggju pensionsskipanina. Sí skjal nr. 42.

Fundarsamtykt: Bjóða FMR og AMR á komandi stýrisfund 24. august kl. 10:00, at greiða frá avleiðingunum av uppskotunum.

Bergmann fyrireikar fundin.

*Støða: Í bíðistøðu*

---

**Fundarmál nr: 43**

FKF Jour. nr: 09-100

Reist av: Innlendismálaráðnum

Fundarmál: Tilbúgving, umboð í arbeiðsbólk

Málslýsing: Í brævi dagf. 7/7-2010 bjóðar IMR felagnum at útnevna eitt umboð í tilbúgvingarsamstarv ímillum land og kommunur.

Avgerð um hetta er tikin á fundi ímillum Anniku Olsen, lsm. og umboð fyri KSF tann 1. juli í ár.

Lagt verður upp til upp til at KSF fær 3 umboð í bólkin, IMR, FMR, VMR, fútin og FKF fáa hvør sítt.

Sí skjal nr. 43.

Fundarsamtykt: Stýrið velur Herálv Jacobsen og Dagfinnur Petersen innsatsleiðari í Vágunum.
Bergmann Finnsso og Kári Thomsen eykalimir.
Mótmæla framgagsháttinum.

*Støða: Avgreitt við skrivi merkt 09-100_3 til Innlendismálaráðið.*

**Fundarmál nr: 44**

FKF Jour. nr: 09-060

Reist av: Skrivstovuni

Fundarmál: ½ árs roknskapur FKF

Málslýsing: Roknskapurin til kunningar. Sí skjal 44.

Fundarsamtykt: Geva nærri frágreiðing um fyrisitingarkostnaðin til komandi fund.

Avseta kr. 6.000,00 til Íslandsferð vegna KIMO.

KIMO fíggjarætlanin uppbrúkt. Samtykt at formaðuring tekur avgerð um at senda ein á heystfundin.

*Støða: Taka upp aftur á komandi fundi.*

**Fundarmál nr: 45**

FKF Jour. nr:

Reist av: Jógvan K. Mørkøre

Fundarmál: KIMO og Island

Málslýsing: JKM skýtur upp at felagið sponsorerar ferð til Íslands, at taka fund við kommunurnar á Eysturlandinum.

Fundarsamtykt: Játtað.

*Støða: Avgreitt.*